**Sjúkrarøktarfrøði**
Fróðskaparsetur Føroya

# Upptøkutreytir

Nýggjar upptøkutreytir, sum eru galdandi til upptøku á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

Upptøkutreytirnar eru miðnámsútbúgving ella samsvarandi útbúgving. Tað merkir, at umsøkjarin skal hava ein av nevndu miðnámsútbúgvingum:
1. Studentsprógv
2. HH
3. HF
4. HT
5. HIF
6. Prógv úr øðrum landi, ið skúlin metir javnt við omanfyri nevndu prógv
7. Aðrar royndir og/ella útbúgvingar, ið kunna sammetast við krøvini í punkt 1-5

Upptøkuplássini verða tillutað umsøkjarum eftir lækkandi próvtali. Grundarlagið er miðaltalið í miðnámspróvnum. Um fleiri umsøkjarar hava sama próvtal, tekur rektarin støðu til, hvør av teimum skal takast upp.

Umsøkjari, sum ikki hevur fingið endaligt prógv, áðrenn umsóknarfreistin er úti, kann søkja um upptøku, og síðan skjótast gjørligt aftaná lidna próvtøku senda prógvið til skúlan. Hesin umsøkjari fær vanliga svar seinni enn aðrir umsøkjarar.

Rektarin tekur avgerð um upptøku av tí einstaka og ásetur samlaða talið av umsøkjarum. Rektarin ásetur samstundis við vanligu upptøkuna eitt tal av bíðilistaplássum, ið er galdandi fyri verandi lestrarár. Bíðilistin er grundaður á sama førleikametingarstøði sum við upptøku.

Um so er, at ein umsøkjari á bíðilistanum ikki innan eina ásetta freist tekur við tilboði um upptøku, fellur rætturin til plássið burtur.

Umsóknarfreistin verður kunngjørd av Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum og er í minsta lagi 2 mánaðar áðrenn lesturin byrjar. Umsóknin verður skrivað á umsóknarblað, sum verður útflýggjað av Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum. Umsóknarblaðið er eisini tøkt á heimasíðuni. Umsóknarblaðið skal latast Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum saman við skjalprógvum fyri atgongugrundarlagnum. Umsøkjararnir skulu hava svar uppá umsókn í seinasta lagi ein mánaða fyri lestrarbyrjan. Umsøkjari, sum verður upptikin, skal innan eina av rektaranum ásetta freist vátta, at hann tekur við tilboðnum.

Rektarin kann gera undantak viðvíkjandi upptøkureglunum um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Sambært Løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum og sambært Kunngerð nr. 123 frá 22 decembur 2006 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum (www.logir.fo)